**Avtala partanna millum í sambandi við áseting av førleikaviðbótum**

Sambært semju frá 31. januar 2012 millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið er ásett orðing um førleikaviðbøtur. Orðingin er sett í sum stk. 4 í § 34 í sáttmálanum.

Ásetingin er soljóðandi:

*"§ 34, Stk. 4. Førleikaviðbót kann latast fyri eftirútbúgving. Hesar viðbøtur eru førleikagevandi og eru knýttar at starvinum. Fyri at kunna fáa førleikaviðbót, skal útbúgvingin verða kravd og eftirútbúgvingin skal verða frá góðkendum útbúgvingarstað. Sjálvt um starvsfólk hava tikið meira enn eina eftirútbúgving, so verður bara ein viðbót latin. Er starvið parttíðarsett, verður viðbótin samsvarandi setanarbrøkinum.*

*Eftirútbúgving 120 tímar: 750,00 kr.*
*Eftirútbúgving 160 tímar: 1.000,00 kr.*
*Eftirútbúgving 200 tímar: 1.250,00 kr."*

Førleikaviðbøturnar eru eitt amboð úti á stovnunum at samsýna starvsfólkunum fyri útbúgving ella eftirútbúgving, sum leiðslan krevur starvsfólkini taka, ella hava tikið.

Tá ið starvsfólk ynskir at taka eftirútbúgving, skal semja vera við leiðsluna á stovninum, um eftirútbúgvingin gevur rætt til førleikaviðbót.

Starvsfólk kunnu eisini sjálvi søkja leiðsluna um førleikaviðbót fyri útbúgving, sum upprunaliga ikki var kravd fyri at røkja starvið, men sum menning/broytingar í starvinum hava viðført er neyðug. Í slíkum førum, skal eisini ein avtala gerast um at eftirútbúgvingin gevur rætt til førleikaviðbót.

Tað er úti á arbeiðsplássunum at avtala um viðbøtur verður gjørd millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara. Sáttmálapartarnir - Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið - skulu ikki góðkenna, at førleikaviðbót verður givin.

Tórshavn, tann 19.03.2013

Fíggjarmálaráðið
Lønardeildin

Starvsmannafelagið